# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

**Evni:** Játtan til heilsugransking

**Spurningar:**

1. Ætlar landsstýrismaðurin at útvega neyðuga peningin til gransking v.m., ið varð fíggjað úr Sjúkrakassagrunninum, so hendan kann halda fram?
2. Nær kann væntast, at møgulig meirjáttan verður tøk?
3. Fer arbeiðið at halda fram eftir sama leisti, soleiðis at peningur eisini verður tøkur til smærri verkætlanir?

**Viðmerkingar:**
Tá ið sjúkrakassarnir vórðu avtiknir í 2009, áttu teir 23,5 milliónir kr. Løgtingið gjørdi av, at pengarnir hjá sjúkrakassunum skuldu brúkast til at menna heilsuøkið í Føroyum. Pengarnir skuldu lutast út til kanningar og gransking á ymiskum heilsuøkjum og í øllum landinum. Avtala varð gjørd við Granskingarráðið um at umsita stuðulin úr grunninum.

Grunnurin er nú tómur, og frágreiðing er gjørd um, hvussu stuðulin er brúktur. Øll, ið hava fingið stuðul úr grunninum, hava fingið høvi at koma við tilmælum um, hvussu stuðul til heilsuøkið kann latast frameftir. Eisini varð frágreiðingin løgd alment fram, og pallborðskjak var um, hvussu peningurin hevur verið gagnnýttur.

Tað er breið semja um, at tað hevur eydnast at menna heilsuøkið munandi hesi árini við peninginum frá sjúkrakassunum í Føroyum. Verkætlanirnar hava givið nýggja vitan, betri heilsutilboð, styrkt fakligar førleikar og samstarv um gransking á heilsuøkinum. Tað hevur eydnast at seta fleiri nýggjar granskarar við, sum fara at kunna flyta okkum enn longri fram á leið.

Stuðul til gransking er íløga, sum í nógvum førum loysir seg fíggjarliga og menniskjaliga. Hetta er ikki minst galdandi í heilsuverkinum, har læknar við granskingarroyndum kunnu átaka sær fleiri serviðgerðir í Føroyum, heldur enn at senda fólk av landinum til viðgerðar. Hetta er í longdini bæði betri og bíligari fyri borgaran og fyri samfelagið.

Eisini hava smærru verkætlanirnar, ið hava fingið stuðul úr grunninum, havt sera stóran týdning fyri áhugafeløg og limir tess kring landið, og tær hava verið við til at skapa størri fólksligt tilvit um nyttuna av gransking fyri tann einstaka.

Niðurstøðan má vera, at tað er neyðugt, at tað almenna raðfestir gransking væl hægri, soleiðis at góða gongdin kann halda fram. Annars kann vandi vera fyri, at vit missa

fólk aftur av landinum og tað, sum er bygt upp, við fænum úr Sjúkrakassagrunninum, verður mist.

Fyri at fáa lýst, hvat landstýrismaðurin ætlar í samband við framhaldandi menning av granskingini á heilsuøkinum, verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 9. mars 2022**

Eyðgunn Samuelsen